# Diamantbrúdleyp

Týsdagin 14. apríl hava hjúnini Jona og Óli Chr. Danielsen í Saltangará verið gift í 60 ár og kunnu halda diamantbrúdleyp.

Jona er úr Rituvík, dóttir Onnu Malenu og Thomas Hans Petersen, og Óli er úr Saltangará, sonur Jenny og Debes Danielsen.

Jona og Óli hava verið vikin í bilvinnuni síðan 1949, tá Óli keypti fyrsta lastbilin. Virkið í dag er kent undir navninum OCD. Tey hava rikið bensinsølu og seinni Statoil Servicestøð við bilverkstaði, bæði til persónbilar og lastbilar.

Jona og Óli eiga 8 børn: Jenny, Anna, Poul Ei, Katrin, Arndis, Tórálvur, Karolina og Símun. Barnabørnini eru 28 í tali, umframt 18 langommu- og abbabørn.

Vinir og kenningar eru vælkomnin at heilsa upp á diamantbrúðarparið í heiminum 2. páskadag eftir kl. 18.

*-red*



# Hanne Jensen 75 ár

Fríggjadagin 10. apríl fyllir Hanne Jensen, Frederiksberg, 75 ár. Hanne Jensen er einkja eftir Bendt Jensen, ið var yvirlækni á Landssjúkrahúsinum 1960-73.



Hóast mong ár eru liðin, síðani læknahjúnini flutti úr aftur Føroyum, og hóast mangar av hennara vinkonum í Føroyum eru farnar undir grønu torvu, hevur Hanne Jensen ongantíð slept sambandið við Føroyar og føroyingar. Hjúnini hava altíð fylgt væl við í føroyskum viðurskiftum og hava lisið føroysk bløð regluliga, og tey nærmastu hjá Hanne Jensen eru føroyingar. Heimið á Godthåbsvej er eitt minni savn við føroyskum málningum, bókum og listaverkum.

Hanne Jensen dugir dugir sum fáur at siga frá Havnini í 60'unum, hendingum og fólkum, ið myndaðu býin tá. Ein donsk havnarkona á Frederiksberg.

Hanne Jensen gjørdist einkja fyri skjótt hálvum øðrum árum síðani, men hon hevur eitt sera lætt lyndi og er ongantíð fallin í fátt. Haraftrat hevur hon sera nógv vinfólk og hevur als ikki stundir at keða seg. Hon gongur javnan á konsert í Radiohúsinum og lurtar nógv eftir klassiskum tónleiki á donskum, svenskum og týskum rásum.

Føðingardagin heldur Hanne Jensen á Godthåbsvej 99, 2000 Frederiksberg. Hon er at hitta á 0045-38869732, 0045-40646800.

# Bilar mikudagin




*Iveco Trakker*




*Fiat Qubo*

Vegna plásstrot í blaðnum eru einki biltilfar við í dag. Ætlanin var m.a. at hava eina grein um lastbilin Iveco Trakker, sum lastbilafyritøkan Metek á Hjalla hevur fingið til landið sum testbil. Samrøða er annars við Petur L. Hansen, stjóra hjá Metek, um bilin á Bilradio á Rás2 leygardagin 11. apríl kl. 13.

Mikudagin 15. apríl verður biltilfarið aftur í blaðnum, har vit m.a. hava meira um Iveco Trakker, eins og vit royndarkoyra nýggja Fiat Qubo. Eisini verða góð brúktbilatilboð frá Ivan Johansen Bilum og Bilrøkt á Bilatorginum á bilasíðunum.

*mg*



†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Albert Hansen, Miðvági**, fer av Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju skírisdag kl. 14.

**Herluf Hermansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 42 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni Skírisdag kl. 14. Tey, ið ynskja at minnast Herluf, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Diamantbrúdleyp**
14. apríl kunnu hjúnini Jona og Óli Chr. Danielsen í Saltangará halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni. Vinir og kenningar eru vælkomnin at heilsa uppá diamantbrúðarparið í heiminum 2. páskadag eftir kl. 18.

**Gullbrúdleyp**
29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 13. apríl fyllir Hjørdis Johansen í Sandavági 80 ár. Dagurin verður hildin í SIF-húsinum frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
12. apríl verður Niels Pauli Mortensen, vanliga nevndur Pallun, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Mikudagin 8. apríl kl. 14 giftast í Ebenezer Ásvør Færø og Bjarni Jøkladal. Móttøka verður eftir vígsluna.Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19 í Studentaskúlanum í Hoydølum

**Brúdleyp**
8. apríl giftast í Keypmannahavn Stine Dobak Jensen, Oslo, og Tummas Planck Reinert, Tórshavn. Adressan er Øresundsvej 92, 2 th., 2300 København S.

**Brúdleyp**
Mikudagin 8. apríl giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 16 Sigrid Mikkelsen og Niels Juel Arge. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

**Brúdleyp**
23. mai kl. 16, giftast í Hoyvíkar Kirkju, Christina Petersen, Havn, og Brian Hansen, Nólsoy. Vælkomst verður í HB-húsinum kl. 19. Tilmelding í seinasta lagi 3. mai, á tlf. 216713 ella 212280

**Brúdleyp**
Leygardagin 9. mai 2009 giftast Marna Kristiansdóttir, Saltnes og Kaj Ennigarð, Syðrugøta. Vígslan verður í Nebo á Toftum kl. 13.00 og veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey sum ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga okkum frá áðrenn 26. apríl á tlf. 258913 / 448319 (Marna) ella 593905 / 441523 (Kaj).

**Prógv**
Fríggjadagin 3. apríl 2009 tók Bárur Friang Rasmussen í Runavík prógv í fakinum Rustfri Klejnsmed (fínsmiður) á Randers Tekniske Skole. Bárur er 28 ára gamal. Hann hevur lært hjá Dino Stål A/S í Århus. Sveinastykkið var ein rustfríur stáltangi og ein mjólkarspann.

